


# Petur Holm • stjóri í Kaupthing • 37 ár

**Lýs teg sjálvan við trimum orðum:**
Eg eri áhaldin, málrættaður og eitt sindur tvætluttur

**Hvat orð ella hvønn setning nýtir tú oftast?**
Eg kann ikki koma í tankar um nakað, men tað er óiva okkurt. Eg sigi ofta "Hetta ber til"

**Hvørjum hyggur tú at hjá hinum kyninum?**
Eg hyggi at øllum, eftir heildini, einki heldur til at standa einsamalt í longdini

**Hvussu langa tíð nýtir tú at gera teg kláran um morgunin?**
Við øllum, frá at eg fari upp, til eg fari avstað, gongur ein tími, men tá havi eg eisini etið og blaðað í avísunum.

**Hvat stressar teg?**
Eg blívi ikki stressaður. Men ting kunnu irritera meg. T.d. tá einføld ting og avgerðir taka ov langa tíð.

**Hvat gleðir teg?**
Tá børnini hjá mær hava tað gott og eru glað

**Nær feldi tú seinast eitt tár?**
Tað eru kortsíðani - Tað vóru eini gleðistár, men orsøkina haldi eg fyri meg sjálvan

**Nær smakkaði tú tær seinast á?**
Næst seinasta vikuskiftið helt eg eina veitslu

**Hvat var seinasta ynskið, sum tú fekst uppfylt?**
Tá eg helt innflytingarveitslu seinasta vikuskifti. Eg ynskti mær ymiskar gávir, og eg fekk nógvar av teimum.

**Hvar arbeiðir tú?**
Eg eri stjóri á Kaupthing Virðisbrævameklarafelag pf

**Hvørji ráð hevur tú til fólk, sum ætla sær inn í fíggjarheimin?**
Áhaldni er týdningarmikið, men arbeiðið er ikki alt.

**Hvat er besta uppfinningin og hví?**
Tað má vera internetið, eg skilji ikki, hvussu man kundi liva áðrenn internetið

**Hvat hevur tú í lummunum beint nú?**
Eg havi eina fartelefon, billyklar, húsalyklar og gjaldskort,. Annars eru lummarnir hjá mær vanliga sum ein damutaska.

**Hvat er títt besta heimaráð?**
Fá tær ein snaps aftur við feitum mati. Hetta eru eini ráð til tíðina, sum kemur nú.

**Hvør er stuttligast í Føroyum og hví?**
Tað er Jákup Weyhe. Hann klárar at yvirraska, hvørja ferð hann ger okkurt, og pjøvist faktiskt einki at gera fyri at vera stuttligur.

**Hvør er keðiligast í Føroyum og hví?**
Tí persóninum havi eg tíbetur ikki møtt enn.

**Hvussu ofta speglar tú tær?**
Eg spegli mær um morgunin, og so hvørja ferð eg standi við eitt hondvask.

**Hvussu ofta ert tú hjá frisør?**
Eg man vera hjá frisør annan hvønn mánað

**Hvør er tín stuttligasta uppliving í starvinum í Kaupthing?**
Vit hava havt nógvar stuttligar upplivingar. Eg dugi ikki at hugsa um nakra einstaka. Vit hava tað stuttligt, bæði tí tað gongur væl, og tí vit leggja seriøsan dent á at hava tað stuttligt.